# Falla ikki í fátt

TB
*Jákup Mørk*

- Hetta var fryktiligt. Meira enn tað fái eg illa sagt.

Soleiðis sigur formaðurin í TB, Sofus Laðanberg, nú hann og hansara enn einaferð máttu ásanna, at elevatortilveran hjá TB millum ovastu fótbóltsdeildirnar ikki er av enn.

Eitt stig var tað, sum restaði í upp til bjargingina, og formaðurin heldur eisini, at hetta kundi verið komið nógvastaðni.

- Tað verður jú so ofta tosað um marginalar, og teir hava vit so ikki havt í okkara parti í ár. Men heilt erligt, so haldi eg ikki, at vit høvdu hetta uppiborið í ár. Liðið var snøgt sagt ov gott til at flyta niður, og tú kanst eisini hyggja at úrslitunum. Har er tað bara HB, sum hevur vunnið allar dystirnar móti okkum, so tað ber ikki boð um nakað botnlið. Men niðrflytingin er so ein veruleiki, sum vit nú mugu fyrihalda okkum til, sigur formaðurin.

Víðari sigur hann, at hóast bitin er tungur at svølgja, so merkir hetta tó ikki, at TB stendur á gravarbakkanum.

- Vit løgdu nógv fyri í ár, men fíggjarliga merkir tað ikki, at felagið er í vanda. Og tað skal ikki valda nakar ivi um, at vit ætla okkum upp aftur sum skjótast. Mánakvøldið fara vit at hava fund við okkara egnu spælarar, og tað er mest sum greitt, at onkur av útlendsku spælarunum eisini er í pottinum til komandi árið.

Enn vil formaðurin ikki seta nøvn á, hvørjir av útlendsku spælarunum verða verandi. Men tað hevur tó ljóðað fleiri staðni, at stinni málverjin, Predrag Markovic, eisini verður á liðnum næsta kappingarár.

ÍF-TB 0-0:

# Javnleikurin var ikki nokk

**Tvøramenn fegnaðust, tá boðini um málið hjá Skála komu til Fuglafjørð. Men bara hálvan minutt seinni, var niðurflytingin kaldur veruleiki**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Tvøramenn stríddust av øllum alvi. Teir hildu seg eisini hava gjørt sítt, men málið hjá GÍ á Skála punkteraði endaliga vónina. Og so verður talan aftur um leygardagsbólt á Sevmýri komandi kappingarár*
Mynd: Jens Kristian Vang

Sum tað er nevnt aðra staðni í blaðnum, so var talan um satt drama, tá GÍ vissaði sær framhaldandi tilveru í fremstu føroysku fótbóltsdeildini.

Og í Fuglafirði var spenningurin ikki minni. Treytirnar undan dystinum vóru, at TB skuldi hava í minsta lagi eitt stig meira enn GÍ.

Tað vildi siga, at talan í øllum førum skuldi verða um javnleik, um TB skuldi hava nakra vón. Men helst av øllum, so skuldu teir vinna dystin, og á tann hátt skapa sær sjálvum tað best møguliga útgangsstøðið.

## Høvdu møguleikar

Dysturin í Fuglafirði varð ongan tíð tann stóra fótbóltsupplivingin. Til tess vóru nervarnir hjá TB helst ov nógvir. Men gestirnir stríddust sera væl, og hóast talan ikki var um nakra greiða leikliga yvirvág, so stóð oftani nógv á ÍF-málinum. Men hvørja ferð, so vórðu meira og minni uppløgdu møguleikarnir misnýttir.

Soleiðis stóð enn á jøvnum, málleyst, tá Lassin Isaksen bríkslaði fyri seinastu ferð. Tá var støðan á Skála enn 1-1, men dómarin hevði ikki meira enn floyta, so varð 2-1 til Skála, og GÍ var í aðru deild.

- Vit trúðu tá, at vit høvdu klárað tað. Alt fór upp at kóka, men brádliga hoyrdu vit so aftur, at GÍ hevði javnað í yvirtíðini. Eg havi ikki orð fyri, hvussu tað kendist, helt Hallur Christiansen hjá TB, tá vit fingu orðið á hann.

Tað merkti, at hóast síni 22 stig, so noyðast tvøramenn aftur tungu gonguna niður í aðru deild.

Bara eitt stig afturat onkra aðrastaðni, vildi verið nóg mikið til bjarging, og í bakspegllinum eru eisini fleiri dystir, sum Hallur kundi ynskt sær endaði øðrvísi.

- Sjálvandi ber illa til at siga akkurát, hvar hatta eina stigið skuldi verið komið. Men tað er klárt, at tað eru dystir, sum tú iðrar teg um, tá munurin nú varð somikið lítil. Ikki minst var tað dýrt hjá okkum, at vit taptu móti VB seinast. Tá hava vit tríggjar risa-møguleikar fyrstu 20 minuttirnar, men vit tapa kortini 2-0. Og so eru eisini aðrir dystir. Tann í Runavík, har teir javna til 1-1 langt inni í yvirtíðini. Fyrsti heimadysturin móti B36, har vit brenna fleiri stórar kjansir, og ikki minst teir báðar heimadystirnar móti ÍF og KÍ. Teir báðir vóru nokk dystir, sum skuldu vinnast, men tað megnaðu vit ikki, staðfestir hann.

## Framtíðin

Tá tosið fer at snúgva seg um komandi kappingarár, tykist Hallur nóg illa at hava svølgt vónbrotinum.

- Beint nú er tað ræðuligt, bara at hugsa um fótbólt. Men tað er einki annað at gera hjá okkum, enn at stríða okkum uppaftur. Eg haldi, at vit hava tað mesta av fólkinum við aftur næsta ár, og so mugu vit bara koyra á. Upp aftur skulu vit í øllum førum, helt hann.

Hjá ÍF hevur tosið í ár fyri tað nógva snúð seg um at stabilisera seg í deildini. Tann setningurin má partvíst sigast at vera rokkin, nú talan gjørdist um eitt sætta pláss. Og hóast munurin niður ikki varð so øgiliga stórur, so hevur talan sjáldan verið um beinleiðis niðurflytingarvanda í felagnum.

So er spurningurin, hvørt teir megna at lyfta seg enn eitt stig komandi kappingarár. Málið er har í øllum førum, og við alt meira ábyrgd á yngru kreftunum í felagnum er veruleikin eisini, at hesir eru búnaðir meira, enn teir vóru fyri tveimum árum síðani.

## FAKTA UM DYSTIN

ÍF-TB 0-0
**ÍF:** Jakob Kaas - Áki Petersen, Poul Ennigarð, Símun Eliasen, Jonn Sólheim Thomsen - Hanus Eliasen, Eyðun Ryggshamar, Høgni Zachariasen, Bárður á Lakjuni - Bartal Eliasen, Sylla D. Amed.
**TB:** Predrag Markovic - Predrag Zivkovic, Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen - Allan Smedemark, Einar Petersen, Jón Tórður Holm, Dan Mortensen - Emmanuel Larbi, Dejan Tomic.
**Dómari:** Lassin Isaksen.
(Gul kort og útskiftingar vanta)

# Guttorm vann fyrsta umfarið

**Fyrsta umfar av TF Vetrarkappingini varð inni á Toftum leygardagin**

RENNING
*tíðindaskriv*

Tey vaksnu runnu teir 10,5 kilometrarnar Runt Agnið. Guttorm Sørensen úr Treysti legði best út hjá monnunum og helt leiðsluna á mál. Hann fekk tíðina 38,56 min. Nummar tvey gjørdist Súni Jacobsen úr Bragdinum við 39,33 min. Og nummar trý bleiv Álvur F. Christiansen úr Treysti við tíðini 40,33 min.; hann vann samstundis bólkin fyri mansunglingar.

Bólkin hjá veteranum vann Jósvein Herup Olsen úr Bragdinum við 41,24 min. frammanfyri Tummas Joensen úr Treysti (42,47 min.) og Óla Olsen úr Bragdinum (43,48 min.).

Hjá kvinnunum vann Valborg Heinesen úr Bragdinum við 45,44 min. Honn vann samstundis bólkin fyri kvinnuunglingar. Nummar tvey gjørdist Durita Djurholm úr Bragdinum við 53,53 min. Og nummar trý bleiv Susan Jacobsen úr Treysti við 57,29 min.

Børnini runnu 5 km. Hjá gentunum vann Bjørk Herup Olsen úr Bragdinum við 19,26 min. Nummar tvey bleiv Rebekka Fuglø úr Treysti (20,40 min.) frammanfyri Rannvu Djurholm úr Bragdinum (20,43 min.)

Jan Elmar Sørensen úr Treysti vann hjá dreingjabólkin við 17,49 min. Nr. tvey gjørdist Robin Jønsson úr Roysninum við 18,18 min, og nr. trý bleiv Hanus Mortensen úr Øravík við 18,46 min.

Næsta umfar av TF vetrarkappingini verður í Klaksvík 19. november.

## HB-LÍF leygardagin

Sum nevnt aðrastaðni á hesum síðum, so gjørdi dómarin í Leirvík av at avblása dystin millum LÍF og HB, tá spælari small um á vøllinum.

Nú hevur FSF so gjørt av, nær nýggjur dystur skal spælast, og verður hesin komandi leygardag kl. 15.00

-mørk

# Krzystof skal venja HB

**Seint í farnu viku gjørdi HB avtalu við Krzystof Popczynski, sum skal venja besta HB-liðið komandi kappingarár**

HB-VENJARIN
*Jákup Mørk*

Tíðindini um, at HB og Krzystof høvdu fundast um komandi kappingarár, eru sum so ikki spildurnýggj. Tað er fleiri mánaðir síðani, at hetta tosið fór at ganga, men góðu úrslitini hjá Julian Hansen høvdu tó hug at punktera tosið nakað. Tað ljóðaði eisini, at leiðslan í HB fyrst vildi viga fyri og ímóti, hvørt teir skuldu seta Julian í sessin heldur enn Krzystof, men tað verður so av ongum.

Hóskvøldið varð endaliga avtalan gjørd, og eftir dystin leygardagin kundi HB so boðað almenninginum frá, at nýggi venjarin er settur.